## WTA-sigur til Wozniacki

Tað eydnaðist ikki í OL, men tá danska Caroline Wozniacki í farnu vikuni var við í China Open í Beijing, eydnaðist donsku tennis-drotningini at vinna sín fyrsta WTA-sigur. Sigurin kom til høldar í double, har Wozniacki spældi saman við Anabel Medina Garrigues, sum annars vann í innanhýsis uppgerðni teirra millum í single-kappingini. Í finaluni spældu tær móti einum kinverskum pari, og hendan dystin vunnu Wozniacki/Garrigues 6-1, 6-3.



## Fleiri trupulleikar til Bayern

Tað gongur einki hjá týska stórliðnum FC Bayern í nýggju kappingini. Seinasta vikuskiftið tapti Bayern stórt, og hetta vikuskiftið var ætlanin, at Bayern skuldi rætta tað mistakið. Men tað eydnaðist ikki. Bayern spældi ímóti Hannover 96, og einasta málið í dystinum skoraði Hannover. Bayern royndi í seinna hálvleiki at trýst, men teir fingu einki mál.

# Spenningurin verður til síðsta bríksl

**Tætta kappingin um at vinna uppflyting til bestu deildina verður neyvan avgjørd fyrrenn í síðsta umfarinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hesa ferð vann TB grannauppgerðina, og so eydnaðist tað kortini ikki hjá VB/Sumba veruliga at seta seg í førarasetrið í 1. deild*

*savnsmynd*

Alt bendir á, at tað ikki verður fyrrenn eftir 27. umfar, at spurningurin verður svaraður um, hvørji tey bæði liðini verða, sum skulu flyta upp úr næstbestu og í bestu deildina. Síðsta umfarið verður leygardagin 18. oktober. At 1. deild verður liðug eina viku frammanundan, at síðsta umfarið í bestu deildini verður, kemst av, at næstsíðsta umfarið verður spælt annan sunnudag ella dagin eftir, at landsdysturin ímóti Eysturríki hevur verið.

Hesa ferð misti VB/Sumba oddasessin 07 Vestur, sum togaði seg upp á sama stigatal sum VB/Sumba, og sum er ovast, tí málmunurin hjá vágamonnum er væl betri, enn hann er tað hjá suðuroyingum. Hjá 07 Vestur er hann 101-32!!, og hjá VB/Sumba er hann 59-23.

Fyrr í summar hevur VB/Sumba tvær ferðir vunnið fulla úrtøku ímóti TB. Leygardagin var VB/Sumba á Sevmýri. TB hevur ikki møguleika at røkka uppflytingarplássi, men tvøramenn vístu, at teir framvegis megna at seta seg væl og virðiliga upp, tá ið tað eru grannarnir, sum teir standa yvirav. TB var væl meiri sannførandi, og nógvu áskoðararnir sóu, at tað ongantíð var ivi um, hvør skuldi vinna stigini.

07 Vestur hevði á pappírinum lættauppgávu á heimavølli, og vágaliðið avgreiddi sín seting væl og virðiliga við 8-2 sigri á teimum næstbestu hjá Víkingi.

Spurningur er nú, hvussu leingi 07 Vestur verður oddalið. Longu leygardagin skal 07 Vestur spæla á Vágseiði. Higartil hevur tað hilnast illa, tá ið 07 Vestur hevur verið sunnanfyri Suðuroyarfjørð. Vágamenn hava tapt 4-0 á Sevmýri og 1-0 í Vági.

Um dreymurin hjá 07 Vestur um Formula fótbólt skal verða veruleiki, so er tað nógv, sum bendir á, at tað verður neyðugt at vinna í hvussu so er eitt stig meiri burturúr triðju ferðini til Suðuroyar.

AB vann trivaligan sigur á teimum næstbestu hjá NSÍ, og AB er nú bara eitt stig aftanfyri tey bæði oddaliðini.

Skráin hjá oddaliðunum í trimum teimum seinastu umførunum sær soleiðis út: 25. umfar: VB/Sumba-07 Vestur, HB-AB, 26. umfar: AB-KÍ, 07 Vestur-NSÍ olg Víkingur-VB/Sumba og 27. umfar: VB/Sumba-EB/Streymur, HB-07 Vestur og B68-AB.

Botnliðini hittust í Streymnesi, har Olgar Danielsen og hansara menn í EB/Streymi vunnu 4-1 á KÍ. EB/Streymur er framvegis aftast og harvið mest upplagdi kandidaturin til niðurflyting, men støðan er ikki heilt vónleys hjá blaðungu monnunum.

Felags fyri bæði EB/Streym og KÍ er tað, at tað kom illa við hjá teimum, at næstbesta liðið hjá B68 vann sannførandi sigur á teimum næstbestu hjá HB. Harvið flutti B68, sum hevur betri málmun enn bæði EB/Streymur og KÍ, seg nærri bjargingini.

## FAKTA um 1. deild

**AB-NSÍ 7-1 (3-0)**
1-0: Magnus Jakobsen
2-0: Alex Mellemgaard
3-0: Evrard Blé
4-0: Thomas Hans Rubeksen
4-1: Dejan Stoikovic
5-1: Dion Splidt
6-1: Tróndur Sigurðsson
7-1: Tróndur Sigurðsson

**TB-VB/Sumba 2-0 (1-0)**
1-0: Teitur Rasmussen 14.
2-0: Allan Poulsen 88.
Reytt kort: Martin Tausen VB/Sumba (2 gul) 40.

**07 Vestur-Víkingur 8-2 (3-1)**
0-1: ??? 5.
1-1: Jovan Panic 11.
2-1: Sjúrður Ellefsen 16.
3-1: Tór-Ingar Akselsen 32.
3-2: ??? 46.
4-2: Jens Erik Rasmussen 56.
5-2: Tór-Ingar Akselsen 56.
6-2: Jens Erik Rasmussen 62.
7-2: Jógvan Holm 75.
8-2: Jón Nielsen 82.

**B68-HB 4-0 (2-0)**
1-0: Óli Olsen 5.
2-0: Óli Olsen 39.
3-0: Badara 52.
4-0: Óli Olsen 76.

**EB/Streymur-KÍ 4-1 (0-0)**
1-0: Arnar Dam 51.
1-1: David Bertholdsen 58.
2-1: Niels Pauli Danielsen 76.
3-1: Bartal Hermansen 82.

